# KIRKJUGRUNNURIN

ÁRSROKNSKAPUR

2023

# Innihaldsyvirlit

INNIHALDSYVIRLIT 2

ROKNSKAPARFRAMLØGA 3

UM ÁRSROKNSKAPIN 2023 4

RAKSTRARROKNSKAPUR 2023 5

VIÐMERKINGAR TIL EINSTAKAR ROKNSKAPARPOSTAR 6

FRÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2023 7

VIÐMERKINGAR TIL FÍGGJARSTØÐUNA 8

# Roknskaparframløga

Hjáliggjandi ársroknskapur fyri 2023 verður sambært § 27, stk. 3, í Ll. nr. 61/2007 hervið lagdur fyri landsstýriskvinnuna at góðkenna.

Tórshavn, 8. mars 2024

**Føroya Stiftsstjórn**

Stiftsstjórnin:

Jógvan Fríðriksson, biskupur

Durita Tausen

Jógvan Ravnsfjall

# Um ársroknskapin 2023

Kirkjugrunnurin varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar".

Sambært § 24, stk. 1, í Ll. nr. 61/2007 fylgir roknskaparárið hjá Kirkjugrunninum álmannaárinum.

Sambært § 24, stk. 3, leggur Føroya stiftsstjórn fyri 1. apríl í árinum eftir, at fíggjarárið er úti, roknskapin hjá Kirkjugrunninum fyri landsstýrismannin at góðkenna.

Niðanfyri eru rakstrarroknskapur fyri 2023 og fíggjarstøða pr. 31. desember 2023. Í notum til fíggjarstøðuna verður greitt frá, hvat ymsu roknskaparpostarnir fevna um. Rakstrarroknskapur og fíggjarstøða eru sett upp eftir sama leisti, sum nýttur verður til "eksternar grunnar", ið verða tiknir við í landsroknskapinum sum fylgiskjøl.

# RAKSTRARROKNSKAPUR 2023

**Kirkjugrunnurin**
Stovnsnummar (001038)

### Rakstrarroknskapur

| Tús. kr. | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Úrslit | - | - |
| Útreiðslur | 85.276 | 79.460 |
| Inntøkur | 85.276 | 79.460 |
| | | |
| **Nettoútreiðsla** | - | - |
| | | |
| **Útreiðslur** | **85.276** | **79.460** |
| 11 Lønir v.m. | 22.055 | 21.940 |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 4.998 | 4.788 |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 343 | 560 |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 7.291 | 5.027 |
| 19 Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | 44 |
| 54 Stuðul til annað virksemi | 45.296 | 45.351 |
| 71 Innanhýsis flyt. millum almenna stovnar, útreiðsla | 3.211 | - |
| 75 Keyps - mvg | 2.083 | 1.750 |
| | | |
| **Inntøkur** | **85.276** | **79.460** |
| *21 Søla av vørum og tænastum* | *297* | *314* |
| *61 Skattur og avgjøld* | *73.552* | *70.911* |
| *63 Vanligar flytingarinntøkur* | *10.100* | *9.600* |
| *67 Rentuinntøkur og vinningsbýti* | *1.327* | *-2.003* |
| *71 Innanhýsis flyting millum almennar grunnar, inntøka* | - | *638* |

## Almennar viðmerkingar:

Sambært § 23, stk. 4 og 5, í Ll. nr. 61/2007 verður møguligt rakstraravlop hjá Kirkjugrunninum avroknað við Tiltaksgrunnin, og møguligt rakstrarhall verður fíggjað av Tiltaksgrunninum. Rakstrarúrslitið hjá Kirkjugrunninum er tí á hvørjum ári null, og Kirkjugrunnurin hevur tí onga sjálvstøðuga eginogn. Standardkontur 71 og 76 ”Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar”, ávikavist útreiðslur og inntøkur, verða nýttar at flyta rakstraravlop úr Kirkjugrunninum og í Tiltaksgrunnin og/ella at flyta upphædd til Kirkjugrunnin at fíggja rakstrarhallið við.

## Viðmerkingar til einstakar roknskaparpostar:

**Konta 54. Stuðul til annað virksemi:** fevnir um tann rakstrarstudning, sum Kirkjugrunnurin sambært fíggjarætlan, ið er løgd fyri einstaka fíggjarárið, rindar einstøku kirkjuráðunum – til viðlíkahald og rakstur av kirkjunum. Goldið var 28,5 mió. kr. í vanligum kirkjuskatti og 13,2 mió. kr. í staðbundnum kirkjuskatti – umframt 3,6 mió. kr. til kirkjur smærri enn 1000 kirkjufólk.

**Konta 61. Skattur og avgjøld:** fevna um vanligan 0,6% kirkjuskatt og staðbundnan kirkjuskatt, sum í mesta lagi kann verða 0,3%. Tað vóru 10 kirkjusóknir, ið kravdu staðbundnan kirkjuskatt fyri 2023.

**Konta 63. Vanligar flytingarinntøkur:** fevnir um játtanina á løgtingsfíggjarlógini 2023 til Kirkjugrunnin.

**Konta 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti:** fevnir um rentuinntøkur á ½ t. kr. í peningastovnum og á 1,3 mió. kr. í Landsbanka Føroya.

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2023

## KIRKJUGRUNNURIN

Stovnsnummar (001038)

**Fíggjarstøða tann, 31. desember 2023 (Tús. kr.)**

| *Notur:* | **OGNIR:** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|---|
| | **Útbúnaður** | | |
| | Grundøki, bygningar, løgur o.t. | 17.955 | 17.955 |
| | Samlaðar avskrivingar | -17.600 | -17.600 |
| | Virðisbrøv | 0 | 0 |
| | Útlán | 0 | 0 |
| | Útbúnaður í alt | 355 | 355 |
| | **Virði í umferð** | | |
| 1 | Aðrir skuldarar | 1.302 | 1.153 |
| 2 | Tøkur peningur | 45.934 | 39.460 |
| | Virði í umferð tilsamans | 47.236 | 40.613 |
| | **OGN Í ALT** | **47.591** | **40.968** |
| | **ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:** | | |
| | **Útjavningarkonta** | | |
| | Salda 1. januar | 0 | 0 |
| 3 | Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit | 0 | 0 |
| | Útjavningarkonta í alt | 0 | 0 |
| | **SKYLDIR:** | | |
| 4 | Umsiting av ogn hjá øðrum | 2.830 | 2.409 |
| 5 | Avseting (skuld) 2023 | 2.536 | -17 |
| 6 | Millumrokning við landskassan | 2.741 | 2.302 |
| 7 | Millumrokning við Tiltaksgrunnin | 39.484 | 36.274 |
| | Skuld í alt | 47.591 | 40.968 |
| | **ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD Í ALT** | **47.591** | **40.968** |

## Viðmerkingar til fíggjarstøðuna:

Mentamálaráðið keypti í 2007 fyri 17,6 mió.kr. 18 prestagarðar frá Folkekirkens Fællesfond, og eru hesir latnir Kirkjugrunninum. Talan er um biskupsgarðin, próstagarðin í Havn og um prestagarðarnar á Heygsvegi í Tórshavn, í Miðvági, í Vestmanna, í Kvívík, í Hvalvík, á Eiði, á Gjaranesi, á Nesi, í Fuglafirði, tveir í Klaksvík, á Viðareiði, á Sandi, í Hvalba, á Tvøroyri og í Vági. Prestagarðurin í Mannbrekku 7 í Hoyvík, varð keyptur í september í 2016 fyri 4 mió. kr. Av tí at yvirtiknu prestagarðarnir longu eru avskrivaðir, er virðið mótbókað á eginpeninginum við somu 17,6 mió. kr. Prestagarðurin í Hoyvík er avskrivaður yvir tvey roknskapar ár, 2/3 í 2016 og 1/3 í 2017.

**Nota 1.** "Aðrir skuldarar" - fevnir í høvuðsheitum um áogn av kirkjuskatti, sum Kirkjugrunnurin hevur mótvegis landskassanum.

**Nota 2.** "Tøkur peningur" - fevnir bæði um tøkan pening og lánsbrøv í Landsbanka Føroya hjá Kirkjugrunninum, og um pening, umleið 2,8 mió. kr., sum Kirkjugrunnurin umsitur fyri onnur – sí notu 4. "Umsiting av ogn hjá øðrum".

**Nota 3.** "Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit" - omanfyri er greitt frá, at rakstrarúrslitið hjá Kirkjugrunninum á hvørjum ári er null, tí møgulig rakstraravlop ella hall verða avroknað við Tiltaksgrunnin.

**Nota 4.** "Umsiting av ogn hjá øðrum" – umframt Grunn Eivind Vilhelms, er talan um pening, sum í fólkakirkjunum verður savnaður inn til ymisk endamál – t.d. neyðhjálp v.m.

**Nota 5.** "Avsetingar (skuld)" – Er játtaður stuðul til Kunoyar kirkju á 2,3 mió. kr. og Sands kirkju á 203 t. kr. Avsett er eisini fyri væntaðum lønarhækkingum í 2023 á 8 t. kr.

**Nota 6.** "Millumrokning við landskassan" – roknskaparhaldið hjá Kirkjugrunninum er partur av búskaparrenslinum hjá landskassanum. Roknskapurin hjá Kirkjugrunninum er ikki partur av landsroknskapinum, men Kirkjugrunnurin nýtir Búskaparskipan landsins og gjaldføri hjá landskassanum. Í 2023 er talan um eina skuld mótvegis landskassanum, á 2,7 mió. kr.

**Nota 7.** "Millumrokning við Tiltaksgrunnin"- ársúrslitið hjá Kirkjugrunninum verður á hvørjum ári avroknað við Tiltaksgrunnin. Tí verður altíð ein millumrokning/ útjavningarkonta við Tiltaksgrunnin.